# Nú kemur Brimil fyrsta dagin

**Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur lagt uppskot fyri tingið um lønina hjá manningina á Brimli. Tekur tingið undir við uppskotinum, kemur Brimil heim fyrsta dagin**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

Nú er málið um Brimil endað í tinginum.

Tað hendi seinnapartin týsdagin, tá ið Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, legði uppskot fyri tingið um at fáa ein enda á trætuni um lønina hjá teimum, sum skulu sigla við Brimli.

Uppskotið, sum er lagt fram, fevnir um alla manningina, hóast tað bara eru maskinmenninir og yvirmenninir á brúnni, sum hava lagt arbeiðið niður.

Karsten Hansen sigur, at orsøkin til, at uppskotið eisini fevnir um teir av manningini, sum eru limir í Starvsmannafelagnum, er, at tað er rættast at lønarásetingar fyri manningina verða viðgjørdar í eini heild.

Tekur Løgtingið undir við uppskotinum hjá Karsten Hansen, kemur Brimil til landið fyrsta dagin.

Uppskotið sigur nevniliga, at beinan-vegin, lógin er samtykt og komin í gildi, skal arbeiðið umborð á Brimli takast uppaftur.

## Nevnd skal áseta lønina

Eftir uppskotinum skal Karsten Hansen skipa fyri, at ein nevnd verður sett at gera av, hvørja løn manningin á Brimli skal hava.

Nevndin verður mannað við seks limum. Av teimum velur Fíggjarmálastýrið tríggjar limir, og tey trý manningarfeløgini, Starvsmannafelagið, Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið, velja hvør sín lim.

Hevur onkur av pørtunum ikki útnevnt sínar limir í nevndina í seinasta lagi sjey dagar eftir, at landsstýrismaðurin hevur biðið hann um tað, verður sorinskrivarin biðin um at útnevnda nevndarlimin.

Til nevndin hevur tikið avgerð, verður Brimil bólkaður sum Tjaldrið. Tá nevndin er komin til eitt úrslit, hevur manningin krav upp á hesa løn frá tí degi, hon byrjar tænastuna umborð og lønin verður tískil dagførd eftir tí.

Nevndin fær freist til 1. mai at koma til eitt úrslit

Men eydnast tað ikki nevndini at semjast, skal hon útnevna ein ástøðumann, sum tekur endaligu avgerðina. Kann nevndin heldur ikki semjast um ein ástøðumann, verður hann tilnevndur av sorinskrivaranum.

Uppskotið kemur til viðgerðar fyrsta dagin.

Karsten Hansen sigur, at nú ein nevnd verður sett, fáa partarnir sostatt ein møguleika afturat at finna eina loysn sjálvir.

Men tað er ikki vist, at allar súðir eru syftar, fyra tað, um Løgtingið samtykkir uppskotið frá Karsten Hansen.Tí, sum tað sæst á grein aðrastaðni í blaðnum, sigur Starvsmannafelagið, at dregur løgtingið viðurskiftini hjá manningini, sum eru limir í Starvsmannafelagnum uppí eina møguliga samtykt um Brimil, noyðist felagið at seta tiltøk í verk.



*– Tað er langtfrá vist, at allar súður eru syftar fyri tað um ósemjan um lønina hjá manningini á Brimli er løgd fyri Løgtingið, tí fakfeløg lova ilt og boða frá, atr tey fara at seta tiltøk*

Formaðurin í Starvsmannafelagnum:

# Karsten Hansen skuldi lagt frá sær

**–Hetta skal steðgast. og vísir Løgtingið ikki málið um Brimil frá sær, fara vit at seta tiltøk í verk, sigur Gunnleivur Dalsgarð**

FAKFELAGSÁGANGUR
*Áki Bertholdsen*

– Hetta er sera, sera álvarsamt. Hevði Karsten Hansen ikki aðrar loysnir enn hetta, átti hann at lagt frá sær.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, er rættiliga skelkaður av, at Karsten Hansen hevur drigið Starvsmannafelagið uppí, nú hann hevur lagt uppskot fyri tingið um at fáa ein enda á ómsemjuni um lønini hjá teimum, sum skulu sigla við nýggja vaktarskipinum, Brimli.

Uppskotið, sum Karsten Hansen hevur lagt fyri tingið, fevnir nevniliga eisini um lønina hjá teimum av manningini á Brimli, sum eru limir í Starvsmannafelagnum, og tað eru teir flestu.

– Vit hava ongantíð torað at hugsað so langt, at hetta kundi koma fyri, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Hann leggur dent á, at veruligar samráðingar hava ongantíð verið ímillum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið um lønina hjá dekkarunum, kokkinum, o.ø. av manningini, sum eru limir í Starvsmannafelagnum.

– Tað, sum Karsten Hansen nú ger, er rætt og slætt at taka sáttmálarættin frá okkum. Og sáttmálasamráðingarrætturin er tað mest grundleggjandi hjá fakfeløguum, so hetta er rættiliga álvarsamt.

– Hevur Karsten Hansen onki annað val, eftir at hava samráðst í fýra mánaðir, er tað dømi um fullkomiligt hjálparloysi, bæði hjá landsstýrismanninum og teimum ráðgevarum, hann hevur afturat sær. Og tí átti Landsstýrismaðurin at lagt frá sær. Og fór hann ikki sjálvir, átti restin av politisku skipanini at tikið neyðugu stigini og skift hann út, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

– Vit hava áður sæð, hvussu lítið skal til, áðrenn landsstýrismenn fara frá. Tað eru ikki nógvar vikur síðani, at ein Landsstýrismaður lá á vippuni, tí hann hevði sagt ov nógv í eini knappari vending.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum heldur eisini, at hetta eigur at fáa avleiðingar fyri teir ráðgevarar, fíggjarmáláráðharrin hevur í hesum málið, tí teir hava eisini so dyggiliga víst sína ómegd.

– Ein grundgeving fyri at Fíggjarmálastýrið ikki vil góðtaka ov stórar lønarhækkingar, er, at tað fer at leggja støðið til tær vanligu samráðingarnar, sum vera í vár.

– Hesi bæði málini hava púra onki við hvørt annað at gera, so tað er onki hald í hesi grundgevingini. Men tað er heldur ikki óhugsandi, at tað eru aðrir politikarar í samgonguni, sum brúka Karsten Hansen til syndabukk fyri at halda lønunum niðri, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.



*– Hetta er tað grovasta eg nakrantíð havi verið úti fyri í allari mínari tíð á arbeiðsmarknaðinum, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum*

## Seta tiltøk í verk

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at limirnir hjá Starvsmannafelagnum eru til arbeiðis umborð á Brimli og at felagið er mitt í samráðingum Fíggjarmálastýrið um lønina

– Tí er onki sum helst grundarlag leggja sáttmálaviðurskiftini hjá okkara limum fyri løgtingið.

Tvørturímóti er hetta eitt tað allargrovastu álopð á fakfelagsrørsluna, eg nakrantíð havi upplivað.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at hansara einasta vón er nú, at Løgtingið vísir málið frá sær.

Hann sigur, at Starvsmannafelagið hevur handað hvørum einstøkum løgtingslimi bræv, har felagið ger støðuna greiða.

– Vit gera eisini løgtingslimum varugar við, at hetta málið hevur so grundleggjandi týdning fyri okkum, at vísir Løgtingið ikki uppskotið frá sær, sleppa vit ikki undan at seta tiltøk í verk - og tað fara vit at gera.

Hvørji tiltøk, talan kann verða um, veit hann ikki rættiliga.

– Men tað kann vera ymiskt. Verður samráðingarrætturin tikin frá okkum, dugi eg t.d. ikki at síggja meningina í at, at okkara fólk fer umborð á Brimil.

– Talan kann eisini verða um onnur tiltøk. Í øllum førum er tað greitt, at hetta skal steðgast og vit fara at gera, tað sum krevst, fyri at steðga tí, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Hann sigur eisini, at hetta er tann ringast hugsandi upptaktin til tær vanligu samráðingarnar, sum verða nú í vár.

– Tað, sum hetta vísir okkum, er, at Fíggjarmálastýrið er til reiðar at fara í tingið við samráðingunum, uttan at hava samráðst yvirhøvur.

# Tað stendur nógv upp á spæl

**– Tað er avgerandi neyðugt, at Brimil fæst í sigling aftur nú, sigur fiskimaálstýrið**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

– Nú stendur nógv uppá spæl og tað er avgerandi neyðugt, at Fiskiveiðieftirlitið nú fæst at virka aftur, sum tað eigur

Hesi boðini hevur Fíggjarmálastýrið fingið frá Fiskimálastýrinum nú uppskot er lagt fyri tingið um at seta eina nevnd at áseta lønina hjá teimum, sum skulu manna nýggja vaktarskipið, Brimil, eins og tað stendur at lesa aðrastaðni í blaðnum.

Í einum brævi, sum Fiskimálastýrið hevur sent Fíggjarmálastýrinum verður støðan gjørd upp

Orsøkin til, at málið er endað í Løgtinginum, er, at Karsten Hansen heldur ikki, at tað ber til at fáa semju við vanligum samráðingum.

Og Fiskimálastýrið sigur, at nú Brimil hevur ligið í meiri enn tríggjar mánaðir, hevur hetta darvað virkseminum hjá Fiskiveiðieftirlitinum rættiliga nógv.

Samstundis hevur tað elvt til eykaútreiðslur við tað, at tað hevur verið neyðugt at leiga tyrlu til eftirlitið.

Fiskiveiðieftirlitið vísir á, at á hávetri eru ikki so nógvir bátar og so nógv skip undir Føroyum, sum um várið

Nú hevur Skipara- og Navigatørfelag eisini sett blokadu í verk móti virkseminum hjá Tjaldrinum, so at virksemið hjá tí hevur eisini verið skert.

– Tí er tað heilt avgerandi, at tænastan fæst at virka nú. Øll eftirlitstænastan og sjóbjargingin stendur upp á spæl, nú vártíðin nærkast, og virksemið er vaksandi, samstundis sum nógv útlendsk skip nú eru byrjað at fiska aftur undir Føroyum, eftir teimum fiskivinnusáttmálum, sum eru gjørdir fyri 2001, sigur Fiskimálastýrið.

– Haraftrat kemur tilbúgvingin á sjónum, sum er ógvuliga skerd, nú Brimil liggur. Skuldi ein oljuvanlukka hent, hevði hetta havt álvarsamar avleiðingar fyri alt landið, nú tilbúgvingin er á so lágum støði sum nú. Tí er altavgerandi, at Fiskiveiðieftirlitið fæst at virka so væl sum gjørligt aftur nú.

– Tí verður ikki mett ráðiligt, at henda støða heldur fram, sigur Fiskimálastýrið.



# Salong Hafnia nýggj býarmynd

GISTINGARHÚS
*Jan Müller*

Eigararnir á Hotel Hafnia í miðbýnum í Tórshavn hava í umbúnað at brúka part av hølunum í gøtuhæddini, sum í dag verður leigað út til handil, til eina hugnaliga "salong", ið viðskiftafólk kunnu brúka.

Tað hevur leingi verið trongligt á hesum so kenda og vælumtókta gistingarhúsinum í hjartanum í høvuðsstaðnum, at eigararnir nú ætla at bøta um umstøðurnar. Eitt er at fáa fleiri songjarpláss, men tað er ikki bara sum at siga tað, tí trongligt er í miðbýnum sum er. Men á Hafnia hava tey eyguni eftir møguligum hølum í grannalagnum. Um nakað spyrst burtur úr vita tey ikki, men tey liggja so framvið.

Men eisini á øðrum økjum verður so roynt at betra um umstøðurnar hjá teimum, sum gista og sum vitja matstovuna. Arbeitt verður við eini ætlan at innrætta hølini, har parfumuhandil er í dag, til "Salong Hafnia". Í fyrstu syftu verður inngongd frá reseptiónini.

Johan Restorff, stjóri sigur, at gongur eftir ætlan, so fáa kundar teirra í ár møguleika at hittast í "Salong Hafnia", áðrenn farið verður til borðs í matstovuni ella veitsluhølunum ella tá liðugt er at eta so at seta seg í hugnaligu salongina. Eisini eru ætlanir um seinnapartar at hava okkurt lætt til matna. Enn eru tó óloystir spurningar, men væntandi verður rokkið á mál, so gestir fáa umstøður til hugna og samveru saman við vinum og viðskiftafólki sigur Johan Restorff, sum heldur, at verður tiltakið væleydnað, so eigur eisini at bera til hjá øðrum, sum koma framvið, at støkka inn á gólvið at fáa sær okkurt leskandi og okkurt til matna.

## Salong gott navn

Vit spurdu Johan Restorff, hví teir hava valt at kalla nýggja staðið fyri "Salong" Hafnia. Til tað sigur hann, at orð salong er nógv brúkt. – Mong minnast aftur á tíðina, tá ein ferðaðist við Tjaldinum. Kahytturnar vóru ikki stórar og matsalurin var bert opin ávísar tíðir á degnum, og ferðin vardi í tvey samdøgur. Hvar skuldu ferðafólkini umborð halda til tá tey ikki sótu í kahýttuni? Jú í "Salongini", tí har var hugnaligt og gott at sita, og fekst eitthvørt at leska seg við, frá sodavatni og kaffi til annan løg, fyri tey, sum høvdu hug til tað. Har varð ikki sett mark ímillum ferðafólkini, men øll trivust væl í sama høli. Sama er galdandi fyri tey, sum í dag ferðast við Norrønu og øðrum ferðamannaskipum millum lond. Tí heldur Johan at tað er náttúrligt á nýmótans hotellum og gistingarhúsum at ein lounge, café ella hvat ein kallar hetta, er til kundarnar, gestirnar.

Stjórin á Hafnia sigur víðari, at gestir javnan spyrja um møguleikan og umstøður fyri at sita fyri seg sjálvan og práta við vitjandi frá býnum, óformelt. Um tey hava eina lounge!

Sum er ber ikki til at veita hesa tænastu, sum gestir annars náttúrliga vænta av hotellinum. Tað er út frá hesum sannroyndum, at Hafnia nú fer undir nýggju tænastuna í hølum í gøtuhæddini á Hotel Hafnia og sum í dag hýsa einum handli.






# Stovna ættargranskingarfelag

Hóskvøldið 1. februar kl. 19:30 verður stovnandi aðalfundur av ættargranskingarfelag, sum serliga fer at arbeiða við ættargransking við teldu, í ÍSF-húsinum í Havn.

Endamál felagsins verður millum annað:

- at skipa fyri fyrilestrum, fundum og øðrum upplýsandi tiltøkum
- at virka fyri at ættargranskingarkeldur verða teldutøkar,
- at samarbeiða við aðrar ættargranskingarfelagsskapir heima og úti,
- at kunna um kunningartøkni innan ættargransking og
- at hava altjóða samstarv við aðrar felagsskapir við sama endamáli

Fyri nøkrum árum síðani bleiv ein roynd gjørd at stovna eitt ættargranskingarfelag, men ikki hevur verið nógv at hoyrt til tað, og tí eru nú stig tikin til at stovna eitt líknandi felag

Hetta felagið, sum nú verður stovnað, fer at leggja stóran dent á at fáa ættargranskingartilfar teldutøkt. Her verður serliga hugsað um at leggja kirkjubøkur, ættartalvur og annað tilfar av áhuga, atkomuligt á internetinum.

Høvuðsstigtakari er:
Göran Wennerstrøm
gw@post.olivant.fo
Tlf: 31 46 48
Mob: 21 46 48